# 110 fólk hátíðarhildu stovningardag

**Týsdagin skipaði reiðaríið, Framherji, sum eigur verksmiðjutrolaran, Akraberg og felagið, EM-Shipping, sum eigur kombineraða nóta-og trolskipið, Høgaberg, fyri stórari veitslu á Hotel Føroyum**



HÁTÍÐARHALD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Dagurin varð hildin í sambandi við, at tað nú eru tíggju ár liðin, síðan felagið varð stovnað og keypti trolaran, Akraberg, sum er fyrrverandi Beinir og Skálafjall, á tvingsilssølu.

Men umframt at skipa fyri døgurðaborðhaldi, sum byrjaði klokkan 19 hetta kvøldið og endaði nakað eftir midnátt, gjørdi Framherji eisini í aðrar mátar rættiliga nógv burtur úr degnum.

Eini 110 fólk vóru við til hátíðarhaldið. Manningar á Akrabergi og Høgabergi við makum, skrivstovufólk við makum, umboð fyri reiðaríið við makum, og somuleiðs vóru tvey umboð úr Íslandi; stjórin í Samherja, sum eigur ein triðing í Framherja og ein sølumaður.

### Gudstænasta

Dagurin byrjaði við gudstænastu í Havnar kirkju, har strandapresturin, Jógvan Fríðriksson, prædikaði, og M.C. Restorff spældi undir sanginum. Eisini sang M.C. íslendska sangin, »Saknaður«.

Síðan var farið niðan á Hotel Føroyar, har Anna Maria Simonsen, sjúkrasystir, greiddi frá kanningini av heilstøðuni hjá landfarafiskimonnum.

Við á Hotel Føroyum var eisini Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, sum við sínum vísdómi um mong lívsins viðurskifti altíð er áhugaverdur at lurta eftir.

Aftrat hesum vóru umboð fyri grannskoðarafyritøkuna, Rasmussen & Weihe, sum við tølum greiddu frá gongdini í fiskivinnuni.

### Døgurðin

Klokkan 19 var klárt at fara til døgurðaborðið, og har fingu tey 110 fólkini – menn og kvinnur – hummara til forrætt og reinsdjórakjøt til høvuðsrætt. Aftan á høvuðsrættin fingu tey ís.

Vakurt sanghefti var prentað til hátíðarhaldið, og góður felagssangur var at hoyra.

M.C. Restorff var frásøgumaður við borðhaldið, og sang hann eisini nakrar sangir. Tað gjørdi Eivør Pálsdóttir eisini.

Onkur sangur var yrktur til haldið.

Við døgurðaborðið vórðu



